# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Við sparikassanum til Beijing

**Norðoya Sparikassi undirskrivaði í dag tvey ára sponsor-avtalu við Heidi Andreasen**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á tíðindafundi í morgun kundi ein fegin Heidi Andreasen skriva undir sponsorsáttmála við Norðoya Sparikassa. Fyrst og fremst, so inniber hesin, at peningastovnurin fíggjarliga stúðlar Heidi í støðugu leiting hennara eftir avbjóðingum.

Tann størsta av hesum verður komandi ár, tá OL er á skránni í kinverska høvuðsstaðnum, Beijing. Men eisini aðrar uppgávur standa fyri framman. Um tvær vikur fer hon til Berlin, har stór kapping er á skránni, og í juli skal hon til Vancouver at kappast.

Og tað verður altso við Norðoya Sparikassa sum stuðuli.




*Smílin vóru stór, tá Heidi Andresen og umboð fyri Norðoya Sparikassa skrivaðu undir sponsorsáttmálan. Ein sáttmáli, sum gevur Heidi munandi betri møguleikar at leggja enn meira í strembanini eftir metum og gulli í svimjihylum kring knøttin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## 10 judarar til Oyl

Judosambandið hevur nú gjørt av, hvørji skulu manna føroyska judo-landsliðið á Oyggja-leikum. Níggju menn og ein kvinna eru tey, sum bókstaviliga skulu berj-ast um heiðursmerki á leikunum. Tey tíggju eru:

**Menn undir 66 kg:**
Jógvan Páll Kristiansen, SJF
Christoffer Olsen, HJF

**Menn undir 73 kg:**
Hjalmar Johannesen, SJF
Áki Davidsen, HJF

**Menn undir 81 kg:**
Búgvi Poulsen, HJF
Jákup Andrias Thomsen, HJF

**Menn undir 90 kg:**
Edvard Johannesen, SJF

**Menn undir 100 kg:**
Petur Sigurð Johannesen, SJF

**Menn yvir 100 kg:**
Zvonko Mrdalo, SJF

**Kvinnur undir 52 kg:**
Inga D. Remmel, HJF

# Klaksvík vann steypakappingina

**Klaksvíkar Talvfelag setti punktum fyri einum framúr ári, tá teir eisini vunnu nýstovnaðu steypa-kappingina fyri lið**

TALV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kappingin, sum varð hildin á Gjáargarði, varð skipað við seks telvarum á vhørjum liði. Og við umhugsanartíð á 15 minuttir til hvørt talvið. 8 umfør vórðu telvað, soleiðis at øll liðini spældu móti hvørjum øðrum.

Væntandi varð, at Klaks-vík, Vestmanna og Havnin fóru at dystast í oddinum. IM Helgi Dam Ziska og Martin Poulsen umboðaðu fremstu borðini hjá Havnini og IM John Rødgaard og Carl Eli Nolsøe Samuelsen fremstu borðini hjá Vestmanna. Klaks-víkingar vóru umboðaðir við Finnbjørn Vang og Ólavi Simonsen á 1. og 2. borði.

Men hóast teir ikki áttu nakran altjóða meistara, so gjørdust klaksvíkingar teir drúgvastu. Men har stóð nógv á. Bert tvey stig skiltu tey trý fremstu liðini.

**Framúr ár í Klaksvík**

Lutakastið vildi tað soleiðis, at Klaksvík og Vestmanna brustu saman longu í 1. umfarinum. Ein dystur, sum Klaksvík vann 4-2. Havnin vann í fjórða umfari 3,5-2,5 á Vestmanna, og tí gjørdist dysturin millum Havnina og Klaksvík avger-andi. Tann dystin vunnu før-oyameistararnir úr Klaksvík, og tá tá Vestmanna spurtaði við tveimum 6-0 sigrum í seinastu dystunum, fóru teir eisini fram um havnar-menn.

Og so kundu klaksvíkingar fegnast um helst besta árið í søgu felagsins. Enn tá í 40 ára føðingardagsárinum.

**TSF STEYPAKAPPING 2007**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Klaksvík | 37,5 |
| 2 | Vestmanna | 36,0 |
| 3 | Havnin | 35,5 |
| 4 | Klaksvík 2 | 24,5 |
| 5 | Sandavágur | 22,0 |
| 6-7 | Rókur | 16,5 |
| 6-7 | Toftir | 16,5 |
| 8 | Vestmanna 2 | 15,5 |
| 9 | Havnin 2 | 12,0 |

## FCK eru meistarar

**Við útisigri í Brøndby hevur FCK enn einaferð sett seg á donsku fótbóltstrúnuna. AaB og Súni Olsen mistu eitt týdning-armikið fet við javnleiki móti FCN**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum tað lagaði seg í dag, so hóvaði tað kanska FCK væl, at teir taptu fyri AaB um vikuskiftið.

Tað gav teimum nevn-liga møguleika at vissa sær gullið "heima" hjá arvafíggindunum úr Brøndby. Einasta málið á Brøndby stadion í kvøld stútaði Marcus Alback í kassan eftir frísparksinnlegg og stút upp á tvørs frá Michael Gravgaard. Eitt korter fyri leiklok sá Tobias Linderoth reytt kort, men kortini var leiðslan hjá FCK ongan tíð av álvara hótt.

Í Aalborg misti AaB týdningarmikið fet í bronsudystinum, tá teir bert megnaðu javnleik móti FC Nordsjælland. Jón Rói Jacobsen var høgri vongverji hjá AaB.

Samstundis vunnu OB og FC Midtjylland sínar dystir, og tí er bronsan nú trý stig burturi hjá AaB.



*Michael Gravgaard og hinir høvu alla orsøk at drekka sjampanju, tá teir á Brøndby Stadion vissaðu sær gullið*
*Mynd: Polfoto/Jens Panduro*